

# Íslendingar merkja eisini truplu tíðirnar í frálandsvinnuni

**Jan Müller**

06.12.2015 - 17:54

Oljan.fo

**Eisini íslendska frálandsvinnan merkir truplu tíðirnar í hesi vinnu. Veitingarskipið, sum íslendska reiðaríið Fafnir Offshore, letur byggja í Norra, verður eitt ár seinkað. Tað skuldi latast í mars næsta ár men er nú útsett til á sumri 2017. Hetta fer eisini at hava negativa ávirkan á úrslitið hjá norsku skipasmiðjuni Havyard og merkja eitt tap uppá 30 mill. kr.**

Havyard Ship Technology AS hevur avtalað við Fafnir Offshore, at skipið verður latið felagnum í juni 2017 heldur enn í mars næsta ár. Veitingarskipið er tað næsta, sum íslendska reiðaríið letur byggja hjá Havyard. Orsøkin til broytingarnar er tann, at tað hevur ikki eydnast reiðaríinum at fáa sáttmálar, við tí avleiðing, at tað hevur ikki eydnast heldur at

fáa langtíðarfígging. Heldur ikki fyrsta skipið hjá Fafnir hevur nakran sáttmála í løtuni. Skipið skal annars eitast at arbeiða fyri sýslumannin á Svarbard 6 mánaðir um árið og restina av tíðini sum veitingarskip til pallar í Norðsjónum.

Útsetingin fær sum sagt óhepnar avleiðingar fyri norsku skipasmiðjuna, sum eisini merkir truplu tíðirnar í vinnuni. Fyritøkan hevur verið noydd til at siga upp fleiri av sínum starvsfólkum.